


*Starvsfólkið á karossaríverkstaðnum hjá P/F Wenzel. Frá vinstru: Herálvur Hansen, Jens Petersen, leiðari, Arnbjørn Bjarnarson, Erling Davidsen, bilmálari, Virgar Trondesen, plátusmiðjulærlingur, Jákup Olaf Jacobsen, plátusmiðjulærlingur og Agnar Carlsson, bilmálaralærlingur. Godtfred G. Joensen, plátusmiðjur, vantar á myndini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

P/F Wenzel, Karossaríverkstaðið:

# Umvæla allar skaðar og øll bilmerkir

**Karossaríverkstaðurin hjá P/F Wenzel við Marknagilsvegin í Havn telist millum teir størstu í landinum. Verkstaðurin er útgjørdur við øllum nútímans amboðum til upprætting og lakkering**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Veturin nærkast, og er tað vanliga árstíðin við »sesong« fyri bilskaðar.

Stóru og nútímans karossaríverkstøðini eru sera væl útgjørd til at taka ímóti hesum skaðum.

Eitt av hesum verkstøðum er karossaríverkstaðurin hjá P/F Wenzel, sum síðan 1993 hevur húsast við Marknagilsvegin.

Leiðarin av verkstaðnum, Jens Petersen, sigur, at verkstaðurin er væl útgjørdur við øllum nútímans amboðum til upprætting og lakkering. Teir umvæla allar skaðar og øll bilmerkir. Teir gera eisini nógvar heillakkeringar av bilum. Hesir skaður koma ofta av teim mongu stormunum um veturin.

Ein stórur partur av arbeiðinum eru tryggingarskaðarnir. Mannagongdin við tryggingarskaðunum er tann, at tá bilurin kemur á verkstaðið við einum skaða, metir verkførarin um skaðan og ger eitt upplegg til sýnsmannin hjá tryggingarfelagnum. Tá so sýnsmaðurin kemur út á verkstaðið, gera teir saman eina felags niðurstøðu.

Um ein bilur t.d. hevur ein stóran frontalan skaða og sær út sum eitt vrak, er tað eingin trupulleiki at gera ein slíkan bil í stand aftur við teimum amboðum, vit hava í dag. Bilurin verður settur í ein upprættarabonk, og teir skaddu lutirnir verða skiftir út við nýggjar, og øll mát passa eftir forskriftum frá verksmiðjuni.

Seks mans arbeiða á Karossaríverkstaðnum, og vit halda okkum alla tíðina dagførdar við tí nýggjasta, sum kemur fram innan okkara fak, sigur leiðarin av verkstaðnum, Jens Petersen.

P/F Wenzel´s Bilútleigan:

# Reinir og snøggir bilar til útleigan

**Bilútleigan er eisini ein deild hjá P/F Wenzel. Tað er Karossaríverkstaðið sum umsitur hesa deild. Bilarnir, sum verða leigaðir út, eru nýggir, væl røktir, reinir, og altíð í góðum standi**

BILÚTLEIGAN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Jens Petersen, leiðari á deildini, sigur, at endamálið við at leiga bilar út er bæði at útvega bilar í samband við bilsakn, í samband við tryggingarskaðar, og til vanliga útleigan av bilum.

Bilarnir, sum verða leigaðir út, eru nýggir, væl røktir, reinir, og altíð í góðum standi.

Talan er um Ford Connect, Ford Focus og Ford Ka.

P/F Wenzel hevur eisini útleiðing av bilum á deildini í Klaksvík.

Áðrenn bilarnir verða leigaðir út, skal leigusáttmáli undirskrivast og koyrikort skal fyriliggja.

Áhugaði eru altíð vælkomin at seta seg í samband við okkum á telefon 354525 ella 554525, sigur Jens Petersen, leiðari á Bilútleigan hjá P/F Wenzel.




*Jens Petersen, leiðari á P/F Wenzel´s Bilútleigan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Nýggjur Focus í 2005

Eftir at hava verið á marknaðinum í seks ár, verður núverandi Ford Focus avloystur av einum heilt nýggjum Focus fyrst í komandi ári. Focus hevur roynst sera væl og er ein av mest seldu bilum yvirhøvur

Síðan Ford Focus fyrstu ferð kom á marknaðin í 1998, eru ikki minni enn 4 milliónir bilar seldir. Hann bleiv ársins bilur í Evropa í 1999, og hann hevur verið heiðraður í Týsklandi sum ein av teimum mest feilfríu bilunum.

Nýggi Focus verður bæði longri og breiðari enn forgangarin, og aksilfrástøðan er størri.

Focus eru kendir fyri sínar góðu koyrieginleikar, og nýggi Focus verður upp aftur betri at koyra enn forgangarin

Bensinmotorarnir verða hesir: 1,4 litur við 80 hk, 1,6 litur við 100 hk, 1,6 litur við 115 hk, og ein 2,0 litur við 145 hk. Dieselmotorarnir verða: 1,6 litur TDCi við 109 hk og ein 2,0 litur Tdci við 136 hk.

Nýggi Focus fær eina av mest framkomnu trygdarskipanum í sínum klassa til at verja tey ferðandi í bilinum.

Bilurin kemur á maknaðin fyrst í komandi ári.





P/F Wenzel, Bilasølan:

# Nýggjheitir frá Ford

**Ford hava fleiri nýggheitir á skránni. Núverandi Ford Focus verður avloystur av einum heilt nýggjum Focus fyrst í komandi ári. Ford Mondeo er komin í eini nýggjari broyttari útgávu og Ford Tourneo Connect fæst nú sum 7 persónabilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

## Ford Mondeo í nýggjari útgávu

Hóast Ford Mondeo er sera væl umtóktur, er hann í harðari kapping í miðalklassanum. Nú er hann so komin í eini nýggjari broyttari útgávu við t.d. nýggjum kølaragittari við kromlistum, nýggjum tokulyktum og nýggjum baklyktum.

Kabinan er eisini gjørd úr betri tilfari og t.d. mittarkonsollin í instrumnetborðinum er nýggj. Bilurin hevur nógvar innbygdardar trygdarskipanir.

Mondeo er ein uppliving at koyra, alt er tilpassað hvørt eftir øðrum, motorurin, undirvognurin og setrini. Bilurin er eisini sera ljóðleysur, og lítið hoyrist til hjólini og motorin inni í kabinuni.

Mondeo fæst í seks ymiskum útgávum: Ambiente, Trend, Sport, Ghia, Ghia X, og ST220. Ghia X er ein heilt nýggj útgáva og er flaggskipið í Mondeo flotanum.



**Prísur úr: kr. 229.900,-**

## Ford Tourneo Connect til 7 persónar

Ford Tourneo Connect fæst nú bæði sum 5 og 7 persónabilur. Bilurin verður gjørdur saman við Ford Transit Connect, ið er vøruvognsútgávan av sama bili

Persónbilurin Tourneo Connect er ein rúmligur MPV, ið fæst við upp til 7 sitiplássum. Bilurin er sera rúmligur, og høgt er til loft og vítt til veggja.

Eisini eru nógvar hyllar og skuffur til at leggja lutir frá sær á.

Um baksetrini verða tikið út, er Tourneo Connect ein stórur og rúmligur vørubilur.

Við 5 setrum í er talan um ein MPV við stórum viðførisrúmi.

Tourneo Connect er uppbygdur sum vørubilur og ber vektina sera væl. Dragihurð á høgru síðu er standard. Motorurin er ein 1.8 Tdci við 90 hk.

**Prísur við setrum: kr. 254.800,-**
**Prísur sum Van: kr. 198.500,-**
**Prísurin fyri Connect sum vørubil er úr kr. 160.000,- v/mvg.**

